## UTTAN ÚR HEIMI

# Ætlar at útbyggja Barsebæck

**Stendur tað til svenska fólkaflokkin, skal Svøríki hava munandi fleiri kjarnorkureaktorar enn nú. Millum annað skal tað umstrídda verkið við Oyrasund byggjast út**

KJARNORKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann frælslynti svenski Fólkaflokkurin ætlar sær at ganga ímóti avgerðini, sum sviar tóku á fólkaatkvøðu fyri 24 árum síðani um at leggja kjarnorkuverkini niður. Flokkurin ætlar tvørturímóti at byggja verkini í Ringhals og Barsebæck út.

Næstformaðurin í flokkinum, Jan Bjørklund, segði við svenska sjónvarpið sunnukvøldið, at verða svensku kjarnorkuverkini ikki bygd út, verða sviar noyddir at innflyta meiri olju og gass fyri at útvega nóg mikið av orku. Tað er beint ímóti politikkinum at avmarka vakstrarhúsárinið, segði hann.

Danskir politikarar hava í fleiri ár kravt, at verkið í Barsebæck verður stongt, tí tað liggur beint yvir av Keypmannahavn. Men Jan Bjørklund heldur lítið um tað danska kravið.

- Danir nýta kol til at framleiða orku. Teir kunnu ikki gera umhvørvinum størri skaða, so teirra atfinningar eru heilt burturvið, sigur svenski floksformaðurin.

Sambært umhvørvispolitikkinum hjá svenska Fólkaflokkinum skal Svøríki hava 13 ella 15 kjarnorkureaktorar um 30 ár.



*Moqtada al-Sadr og bólkur hansara Mehdi hótta við at gera seg inn á amerikanarar og teirra leigusveinar í Irak. Tey fyrstu álopini hjá bólkinum kostaðu fleiri hermonnum lívið*
*Mynd: Reuters*

# Nýggjur yvirgangsbólkur hóttir við blóðugum bardaga

**Ein higartil ókendur sjiamuslimskur bólkur í Irak hóttir við at gera Irak til ein blóðugan vígvøll í bardaganum ímóti USA**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mehdi-bólkurin gjørdi fyri fyrstu ferð vart við seg um vikuskiftið og tað við lít. Í tí fátæka býnum Sadr uttan fyri Bagdad lógu sjey amerikanskir hermenn eftirá, og minst 22 vórðu særdir, tá limir í Mehdi tóku valdið á løgreglustøðini og fleiri øðrum bygningum í býnum.

Í býnum Najaf lupu limir í Mehdi-bólkinum á eina herstøð hjá hermonnum úr Spania og El Salvador, og har doyðu minst 24 fólk í samanbrestinum, teirra millum ein amerikanskur hermaður og ein úr El Salvador. 19 hermenn vórðu særdir.

Úr býunum Kirkuk, Nassiriya og Basra frættist eisini frá ófriði, har limir í Mehdi-bólkinum skipaðu fyri.

- Hersetingarvaldið er okkara fíggindi, og Guð fer at samsýna okkum fyri tað, vit gera, segði leiðarin í bólkinum, Moqtada al-Sadr, sunnudagin sambært tíðindastovuni Reuters.

Fyri einum ári síðani stongdi amerikanska herleiðslan eitt blað, sum tann víðgongdi sjiamuslimski leiðarin gav út. Orsøkin var sambært amerikanarunum, at blaðið eggjaði til uppreistur, men Moqtada al-Sadr hevur alla tíðina lovað, at hann fór at hevna avgerðina.

- Eg og mínir trúgvu fylgisveinar eru undir ágangi frá hersetingarvaldinum og teirra leigusveinum. Vit fara at gera okkum inn á teir allastaðni, segði al-Sadr sunnudagin.

Amerikanska herleiðslan er serliga ørkymlað av hevndarálopunum, tí Mehdi-bólkurin er sjiamuslimskur og umboðar harvið ein part av meirilutanum av fólkinum í Irak. Umleið 60 prosent av irakska fólkinum eru sjiamuslimar. Higartil hava amerikanararnir serliga møtt mótstøðu frá tí sunnimuslimska minnilutanum og útlendskum yvirgangsmonnum. Tí ørkymlar tað amerikanararnar, at partar av tí sjiamuslimska meirilutanum eisini eru farnir at gera so ógvusliga mótstøðu, skrivar Reuters.

Sunnimuslimarnir halda eisini fram við sínari mótstøðu. So seint sum sunnudagin doyðu tveir amerikanskir hermenn, tá teir vórðu álopnir í tí í sunnimuslimska býnum Falluja.

USA hevur nú mist 610 hermenn í Irak.

# 10 ár síðani fólkamorðið í Rwanda

**Í dag eru 10 ár, síðani tað ræðuliga fólkamorðið í afrikanska landinum Rwanda byrjaði**

FÓLKAMORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um kvøldið tann 6. apríl í 1994 varð flogfarið við rwandiska forsetanum Juvenal Habyarimana skotið niður. Tað gjørdist byrjanin til eitt av teimum ringastu fólkamorðunum í nýggjari tíð, og tær næstu trettan vikurnar vórðu umleið 800.000 fólk myrd.

Altjóða samfelagið visti, hvat hendi, men gjørdi einki fyri at steðga fólkamorðinum.

Men Rwanda kundi sloppið undan ræðuleikunum, høvdu ST og Vesturheimurin sent eitt friðarvarðveitandi herlið til landið. Tað skrivar kanadiski heryvirmaðurin Romeo Dallaire, sum stóð á odda fyri einum lítlum ST-liði, sum var í Rwanda, men sum var so illa mannað, at tað fekk einki gjørt. Men sambært heryvirmanninum høvdu ST og Vesturheimurin góða tíð at fyrireika seg, tí fólkamorðið var lagt til rættis fleiri vikur frammanundan, sigur hann.

Núverandi rwandiski forsetin, Paul Kagame, leggur altjóða samfelagið undir at hava gloymt tey, sum gjørdust offur fyri fólkamorðinum fyri 10 árum síðani. Hann sigur, at tað var húðarliturin hjá offrunum, sum gjørdi, at hvørki ST, ES-londini ella Clinton-stjórnin í USA rættu hond frá síðu fyri at fyribyrgja tí, sum hendi.

Hesa vikuna eru minningarhald um alt Rwanda til minnis um tey umleið 800.000, sum lótu lív í fólkamorðinum.




## SAMFELAGSSTEVNA Á PÁSKUM

Um Gud vil verða hesi møti á páskum í Siloa í Fuglafirði og Ítróttarhøllini á Kambsdali:

**Skírisdag 8. apríl**
Í Siloa Møti kl. 18.00

**Langafríggjadag 9. apríl**
Í Siloa Møti kl.18.00

**Leygardag 10. apríl**
Á Kambsdali Temamøti kl. 15.00
**Evni:** "So kemur tá trúgvin av tí, sum talað verður"
- Tín ábyrgd í samkomuni

Evangelisk sangløta kl. 20.00 við Siloa-kórinum o.ø.

Í Siloa Opið hús fyri ung og eldri kl. 22.00

**Páskadag 11. apríl**
Á Kambsdali Minnismáltíð Harrans kl. 11.00
Familjumøti kl. 16.00
Nátturði kl. 17.00
Møti kl. 18.00

Í Siloa Opið hús fyri ung og eldri kl. 22

**2. Páskadag 12. apríl**
Á Kambsdali Familjumøti kl. 16.00
Nátturði kl. 17.00
Møti kl. 18.00

**Verið hjartaliga vælkomin !**

Samkomurnar í Mizpa á Eiði, Hebron í Leivík, Filadelfia í Gøtu, Siloa í Fuglafirði

FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Røgvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

-eitt sera gott tilboð frá Makita




**Sera kraftmikil og handy bor- og skrúvumaskina**
- Sera høgt snúðingsmoment
- 13mm sjálvspennandi boripatrón
- Verður latin í kufferti v/ ladara og 2 battaríir

**Íroknað í prísinum er hondlampa við innbygdum radio**

**Bert 2.195,-**

THOMAS DAM
**Pf. THOMAS DAM**
**amboð & maskinur**
Jónas Broncksgøta 25 • Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

## Til sølu



Ein Nissan Patrol 3.0 Turbo diesel, 2 setur, el-leðursetur v/ hita, el-sóltak, klimaanlegg, árg. 11/2000.
Verður seldur um hóskandi boð fæst.
Prísuppskot: 230.000 kr.

Áhugað kunnu venda sær til vinnulívsdeildina á tlf. 31 13 50.

**Føroya Banki**




RÁÐSTEVNA · Global Diversity Survey



Handfara ólíkheitir
- størri týdning fyri arbeiði enn vit halda

**Til allar virkisleiðarar, leiðarar privat/alment og lyklapersónar í fyritøkum**

- Ólíkheitir
- Starvsheiti
- Útbúgving
- Heilsa
- Brek
- Preferansir
- Aldur
- Kyn

Fyrilestrahaldari
**Armida Russel**

Fremst í heiminum innan handfaring av ólíkheitum



**Á Hotel Føroyum 16. apríl 2004 kl. 09.30 - 19.00**
**(tilmelding 14. apríl 2004 á floodrocks@floodrocks.com)**

FloodRocks
*Lave kursinvesteringer - stort utbytte*
TEL 32 22 95 · FARTEL 52 22 95
TEL 0047 73 95 00 60 · FAX 0047 73 95 13 01
FLOODROCKS@FLOODROCKS.COM

Sosialurin 341800




-tað loysir seg